Tórshavn, tann 31. mai 2016
J.Nr.: LUM-19- 15/00003-27
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðvíkjandi klagu um, at løgmaður ikki vildi gera samrøðu til sjónvarpssending

Við soljóðandi teldubrævi 30. desember 2014 vendi Kringvarp Føroya sær til umboðsmannin:

> "Kringvarpið vil við hesum kæra avgerð hjá B, løgmanni, ..., um ikki at vilja luttaka í sjónvarpssending um fiskivinnu, sum A, journalistur í Kringvarpinum, er í ferð við at gera.
>
> Málið hevur skund, tí landsstýrið ætlar at leggja fiskivinnunýskipan fram áðrenn 1. februar, men ógjørligt er hjá Kringvarpinum at viðgera hetta álvarsmál, tá maktfullastu aktørar í nýskipanini ikki vilja luttaka í sendingini."

Klagan, sum var viðheft teldubrævinum, er dagfest 29. desember 2014, og var soljóðandi:

> "Kringvarp Føroya vil við hesum kæra, at løgmaður, B, ikki vil gera samrøðu við A í sambandi við sending um riknu fiskivinnuna í Føroyum. Fiskivinnan, sum er grundarlagið undir okkara búskapi.
>
> Vit kæra løgmann, B, fyri ikki at halda vanligar fyrisitingarreglur, fyri ósakliga at nokta at gera samrøðu við navngivnan journalist og fyri ikki at taka atlit at talufrælsinum.
>
> Hetta er ikki fyrstu ferð, at løgmaður noktar at úttala seg til Kringvarpið/A. Løgmaður vildi heldur ikki luttaka í sjónvarpssendingunum um Eik banka, sum vóru sendar í Kringvarpi Føroya á heysti 2014, og heldur ikki til sendingina um Tollmálið, sum var send á vári 2014, vildi hann gera samrøðu við Kringvarpið/A.
>
> Tað er ein fólkaræðisligur trupulleiki, at løgmaður konsekvent noktar at gera samrøðu við Kringvarpið/A. Vit hava sum frælsur miðil, enntá við public service-skyldum, skyldu at lýsa og viðgera politisku stórmálini í Føroyum. Vit hava eisini skyldu til kritiskt at viðgera

politisku kósina, sum løgmaður setur út í kortið. Føroyski borgarin hevur rætt og slætt krav upp á at vita, hvussu landsstýrið tænir Føroya fólki. Við konsekvent at nokta at úttala seg forðar løgmaður Føroya fólki í at fáa neyðuga vitan um og innlit í, hvussu landið verður rikið. Løgmaður forðar fyri almenna kjakinum, sum í vælvirkandi fólkaræði er grundarlagið undir øllum politiskum avgerðum.

Vit vilja vísa á, at løgmaður hevur skyldu til at gera samrøðu við okkum. Løgmaður, sum er landsins hægsta embætisfólk, kann ikki gera mismun á miðlum og journalistum. Fríggjadagin 28. november (2014) úttalaði løgmaður seg til Dimmalætting um fiskivinnunýskipanina. Mánadagin eftir, 1. desember, biður A um samrøðu við løgmann. Kunningarráðgevin hjá løgmanni og A samskifta nakað um spurningar, men so kemur kunningarráðgevin við svarinum, at løgmaður ikki ynskir at luttaka í sendingini, tí:

> *"Hann heldur ikki, tað er rætt at úttala seg, nú tilgongdin at orða eina fiskivinnunýskipan er í gongd."*

A ger greitt fyri kunningarráðgevanum, at flestu spurningarnir eru afturlítandi, men svarið frá løgmanni umvegis kunningarráðgevan er greitt:

> *"Hann sigur seg ikki vera sinnaðan til at gera samrøðu til sendingina."*

Undirritaða (tíðindaleiðarin í Kringvarpinum, *mín viðmerking.*) vendir sær til løgmann, og biður hann umhugsa støðuna enn einaferð. Tá svaraði løgmaður beinleiðis:

> *"Eg havi ikki álit á A, longri er søgan ikki."*

Hetta er løgmaður eisini siteraður fyri á heimasíðuni hjá Norðlýsinum, www.nordlysid.fo. Sí: http://www.nordlysid.fo/logmadur+vil+ikki+gera+bandadar+samrodu+vid+kvf.html

Hetta er ikki í lagi. Løgmaður hevur onga grund til alment at siga, at hann hevur mist álitið á A ella á Kringvarpinum. Um løgmaður metir, at hann ikki er væl viðfarin av A ella av Kringvarpinum, eigur hann at nýta teir instansir, sum eru til at gera vart við hansara ónøgd. Í hesum førinum Fjølmiðlanevndina. Fjølmiðlanevndin, sum løgmaður sjálvur setur, og sum hevur eittans endamál: at tryggja, at leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið verða hildnar, og at tey, ið eru fyri skotum, sleppa at svara aftur. Løgmaður hevur ongantíð kært Kringvarpið fyri brot á hesar reglur.

Tað er eisini vert at leggja til merkis, at orsøkin til at nokta at luttaka í sjónvarpssendingini um rikna fiskivinnupolitikkin broytist frá at vera spurningur um, hvørt tað er ráðiligt hjá løgmanni at úttala seg um komandi fiskivinnunýskipan til at vera spurningur um álit á navngivnan journalist hjá Kringvarpinum. Í sambandi við sendingina um "Tollmálið" var orsøkin, sum embætisfólk á Løgmansskrivstovuni góvu, at løgmaður hevði úttalað seg um málið fyrr, og at talan var um privat viðurskifti hjá D (táverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum, *mín viðmerking.*) Í sambandi við sendingina um Eik, var orsøkin, sum embætisfólk endurgóvu løgmann fyri siga, at hann ikki úttalaði seg um málið, meðan tað varð kannað av eini grein 19 nevnd. Men fyri Norðlýsinum gevur løgmaður eina heilt aðra

grundgeving fyri, hví hann ikki luttók í sendingini um Eik: Hann hevur mist álitið á A. Her er einki samsvar millum orsøkirnar, sum embætisfólk endurgeva løgmann fyri, og tað løgmaður sjálvur sigur.

Fyrrverandi danski umboðsmaðurin, Hans Gammeltoft-Hansen, hevur í niðurstøðu gjørt greitt, at ósakligar grundgevingar, so sum vantandi álit á navngivnan journalist, ikki kann leggjast til grund fyri at nokta at gera samrøðu við ein miðil. Sí:
http://www.ombudsmanden.dk/find/nyheder/alle/BE afsluttende/Endelig redegoerelse BE/

Løgmaður er sum nevnt ikki bara ovasti politikari í landinum, men eisini ovasti fyrisitingarligi myndugleiki. Tað vil siga, at hann er undirlagdur fyrisitingarlógina og skal halda góðan fyrisitingarsið. Altso skulu løgmaður og landsstýrisfólk annars halda vanligar fyrisitingarreglur, so sum líkaregluna og sakligheit, umframt at atlit skulu takast til talufrælsi. Tað hevur fyrrverandi danski umboðsmaðurin, Hans Gammeltoft-Hansen, gjørt greitt í niðurstøðu um, at Anders Fogh Rasmussen, táverandi forsætisráðharri, ikki vildi gera samrøðu við navngivnan journalist á Ekstrablaðnum. Sí avgerð hjá umboðsmanninum her:
http://www.ombudsmanden.dk/find/nyheder/alle/Afslutning af sag om afslag/

Eisini hevur fyrrverandi danski umboðsmaðurin skrivað klummu um sama mál. Sí:
http://www.ombudsmanden.dk/find/nyheder/alle/Kronik i JP/Pressemeddelelse 12 6 07.Pdf/

Løgmaður kann tí ikki nokta at gera samrøðu við A í Kringvarpinum um rikna fiskivinnupolitikkin, tá hann í øðrum miðlum úttalar seg um júst sama. Løgmaður kann heldur ikki nokta at gera samrøðu við A, tí hann sigur seg ikki hava álit á honum. Hetta er ikki nóg neyv grundgeving. Og at enda er tað ræðandi, at landsins hægsti myndugleiki, løgmaður, ikki tekur atlit til talufrælsið og harvið almenna kjakið um fiskivinnuna, sum er grundarlagið undir okkara búskapi.

Vit vóna, at Løgtingsins umboðsmaður vil taka hetta prinsipiella mál upp og skjótast gjørligt koma við úrskurði fólkaræðinum at frama."

Við teldubrævi 13. januar 2015, hevur A, journalistur, sent umboðsmanninum soljóðandi uppískoyti til klaguna:

"Bara sum ein eyka undirstriking av, hvussu tað verður gjørdur munur móti journalistum:

Løgmaður tosaði við Dag & Viku í gjár, 12. januar (2015) um arbeiðið við fiskivinnunýskipanini. Hann tosaði eisini við heimasíðuna ting.fo 8. januar (2015).
..."

**Málsgongd**

Av tí at klagan omanfyri og partshoyringin niðanfyri lýsa málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

**Partshoyring**
Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivum, dagfest 7. og 14. januar 2015, vórðu klagan og uppískoytið til klaguna send Løgmansskrivstovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis varð Løgmansskrivstovan biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 4. februar 2015 sendi Løgmansskrivstovan umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Gongdin í málinum er henda:
>
> 30. november 2014 skrivar A, journalistur til fjølmiðlaráðgeva løgmans, E:
>
> > *"Kanst tú tjekka, um løgmaður hevur tíð til at gera eina sjónvarpsamrøðu hesa vikuna i samband við eina sending, sum vit gera um ymsar avbjóðingar i samband við verandi fiskivinnuskipan, og eina møguliga nýskipan av fiskivinnuni."*
>
> Sama dag spyr E aftur:
>
> > *"Meira ítøkiliga?"*
>
> 1. desember 2014 svarar A aftur:
>
> > *"Vit gera eina samanumtøku av tí, sum er farið fram innan fiskivinnuna við hesi nýggju skipanini. Serliga við fokus á, hvat er farið fram síðstu árini sjálvandi.*
> >
> > - *Tað vil siga, at vit mugu tosa um, hvørt skipanin við avmarking av útlendskum ognarskapi riggar. Hvat skal lógin vera í einari komandi skipan.*
> >
> > - *Riggar skipanin við fiskidøgum, sum verða ásettir í Løgtinginum?*
> >
> > - *Landsstýrismaðurin býtir undir verandi skipan virðir fyri á leið 2 milliardir krónur út - uttan serliga greiðar mannagongdir, raðfestingar ella gjøgnumskygni. Hetta tykist vera í stríð við øll vanlig ideal um rættartrygd og góða fyrisiting. Hví góðtekur løgmaður eina tilíka skipan?*
> >
> > - *Búskaparfrøðingar meta, at árligu loyvini kundu verið seld fyri umleið hálva milliard um árið. Hví hevur landsstýrið ikki tikið av møguleikan at fáa hesa inntøku? Hvussu verdur undir komandi skipanini?*
> >
> > - *Seinastu 5 árini hava vit fingið nýggj rættindir fyri eitt virði millum 1 og 2 milliardir. Onkur búskaparfrøðingur hevur sammett hetta við at finna olju. Er ikki ein stór andsøgn í, at samstundis sum vit hava fingið hesi virðir, so hevur landskassin stór hall og grundleggjandi vælferðartænastur halta. Hvussu ber tað*

*til, at landskassin ikki hevur fingið meir burturúr, at føroyska samfelagið hevur fingið hesi rættindir?"*

E svarar aftur 2. desember 2014:

*"Hvør annar luttekur?"*

Og fær sama dag svar frá A:

*"Ikki endaligt enn. Ymiskir fiskivinnu- og búskaparserfrøðingar. Onkur úr vinnulívinum, nakrir politikarar."*

3. desember 2014 skrivar E aftur:

*"Løgmaður er ikki sinnaður at taka lut í sendingini. Hann heldur ikki, tað er rætt at úttala seg, nú tilgongdin at orða eina fiskivinnunýskipan er í gongd."*

Sama dag svarar A aftur:

*"Teir flestu spurningarnir eru nú rættiliga afturlítandi. Um hvat er farið fram undir løgmansskeiðinum og í dag. Um løgmaður ikki vil tosa um komandi skipanina, so kunna vit halda okkum til spurningarnir um, hvat tað er, sum er farið fram higartil."*

5. desember 2014 svarar E aftur:

*"Hann sigur seg ikki vera sinnaðan til at gera samrøðu til sendingina."*

10. desember 2014 skrivar F, tíðindaleiðari í Kringvarpinum, til løgmann, har hon staðiliga mótmælir, at løgmaður ikki vil gera samrøðu við A, journalist í Kringvarpinum. Hon grundgevur m.a. serliga við, at tað er ein fólkaræðisligur trupulleiki, at løgmaður ikki medvirkar til at upplýsa eitt mál, at løgmaður ger mun á journalistum og vísir á fólkatingsumboðsmannaavgerð í líknandi donskum dømi. Eisini heldur hon, at evt. misnøgd eigur at verða latin fjølmiðlanevndini til avgerðar. At enda hóttir hon við at klaga løgmann fyri løgtingsumboðsmanninum. Løgmaður svarar sjálvur F stutt aftur sama dag, har hann sigur:

*"Tú hevur fullan rætt at kæra til Løgmansskrivstovuna (her er helst talan um skrivifeil; standa skal "løgtingsumboðsmannin"), eg havi ikki álit á A, longri er søgan ikki, og hann ikki á mær."*

...

Í einari tjóð er øgiliga týdningarmikið, at ein demokratiskt valdur stjórnarleiðari hevur framsagnarfrælsi at siga júst tað, hann ynskir. Er tað so, at nakar roynir at leggja stjórnarleiðaranum hindringar í vegin at siga sína hugsan ella tvingar hann at siga nakað ávíst, er tað í flestu londum at rokna sum álvarsmál.

At nokta at úttala seg um eitt mál, ella nokta at luttaka í eini samrøðu, er bert ein tigandi máti at úttrykkja seg uppá og er tí ein variantur av talufrælsinum. Rætturin ikki at siga nakað.

Er tað so, at nakar hevur í ætlan at krevja av løgmanni, at hann skal úttala seg um eitt mál, má lógarheimildin fyri hesum vera púra greið, tí at hetta er eitt inntriv í hansara framsagnarfrælsi.

Samsvarandi rættargangslógini § 168 hevur løgmaður skyldu at úttala seg, verður hann innkallaður sum vitni í rættarmáli. Somuleiðis hevur hann skyldu at úttala seg mótvegis kanningarstjóra eftir stýrisskipanarlógini § 38, stk. 4, eins og hann eisini hevur skyldu til at úttala seg mótvegis nevnd, sum Løgtingið setur sbr. stýrisskipanarlógini § 19. Mótvegis Løgtinginum hevur løgmaður eftir landsstýrisábyrgdarlógini § 5, stk. 2 rættiliga stóra upplýsingarskyldu.

Men journalistar hava sbr. lóggávuni ikki rættarkrav uppá, at løgmaður úttalar seg um mál. Teir hava rættarkrav uppá innlit í fyrisitingina sambært innlitslógini og kunnu altíð royna at fáa fólk at úttala seg, men teir hava ikki møguleikan at krevja, at fólk úttala seg.

Fyrisitingarrætturin fevnir um alla vanliga fyrisiting, sum løgmaður stendur fyri, har hann ger eitthvørt, sum hoyrir til embætið, antin við heimild í lóg ella í kraft av starvinum. Men generelt at úttala seg um politisku viðurskiftini í landinum, eitt nú um hvørja fiskivinnulóggávu man í framtíðini skal hava, kann aldrin gerast ein partur av vanligum fyrisitingarrætti. Ójavni kemur eisini í politisku skipanina av hesum. Løgmaður skuldi so verið fevndur av óskrivaða fyrisitingarrættinum, tá ið hann kjakast um framtíðar politisku skipanina. Tingmenn og floksformenn, sum kjakast ímóti honum, eru ikki fevndir av hesum reglum.

Landsins hægsti leiðari má hava møguleika at reagera, metir hann seg ikki hava álit á einum journalisti, og so serliga við einum so høviskum inntrivi, sum ikki at siga nakað við viðkomandi journalist.

Í ítøkiliga førinum hevur løgmaður tikið tað minst møguliga stigið sum reaktión ímóti, at hann ikki hevur álit á ávísum journalisti. Hann setir seg ikki ímóti samrøðum sum heild frá journalistum í Føroyum ella øðrum journalistum í Kringvarpinum, men ynskir ikki at gera samrøðu við viðkomandi journalist, tí at hann hevur so ringar royndir av honum. Tað mugu verða latnar løgmanni rættiliga víðar ræsir at gera av, hvørt hann metir seg hava álit ella misálit á einum journalisti. Ein slík meting letur seg illa objektivisera hjá øðrum at eftirmeta, og sjálvsagt mugu vit leggja til grund, at løgmaður hevur sakligar grundir fyri at nokta; í øllum førum má tað verða journalisturin sum lyftir próvbyrðuna fyri ósakligum grundum.

Dregur man ta niðurstøðu, at líkheitsbetragtningar føra til, at eitt rættarkrav er um at fáa samrøður við løgmann, tí at onnur fáa samrøður, so er rættarkeldan, sum liggur til grund fyri hesum, ógvuliga veik og óskrivað. Og spurningurin er, hvørt tað er forsvarligt. Tá tambar man óskrivaða fyrisitingarrættin so langt út, at man kann spyrja seg sjálvan, um

man ikki skapar ein nýggjan rættarstand heldur enn at konstatera ein verandi rættarstand. Ynskir ein slíkan rættarstand, eigur slík skylda hjá løgmanni at úttala seg til journalistar, at verða útgreinað í løgtingslóggávu og ikki á einum lægri rættarkeldustigi. Ójavni kemur eisini ímillum almenna kringvarpið og løgmann av slíkari niðurstøðu. Fyrisitingarrætturin geldur ikki fyri alment settar journalistar, tá teir ætla sær at gera samrøðu, øvugt skuldi hann verið galdandi fyri løgmann. Við øðrum orðum skal løgmaður út frá líkheitsbetragtningum geva møguleika fyri samrøðu. Løgmaður kann øvugt, út frá líkheitsbetragtningum, ikki krevja at fáa eina samrøðu.

Tað er ikki rætt, sum ført verður fram, at løgmaður noyðist at klaga til fjølmiðlanevndina, er hann ónøgdur við tíðindaflutning. Út frá vanligum proportionalitetssjónarmiðum má tað bera til hjá honum at taka eitt minni stig nevniliga ikki at geva viðkomandi journalisti møguleika at fáa tilfar, har vandi er fyri, at løgmaður enn einaferð verður útsettur fyri tiltøkum, sum gera, at hann ikki kann hava álit á journalistinum.
---
Málið er sera principielt. Tí er ikki annað enn rímiligt, at løgmaður fær eina ætlaða niðurstøðu frá Løgtingsumboðsmanninum til ummælis, áðrenn hon gerst endalig, soleiðis at óneyðugar misskiljingar ikki koma fyri."

Saman við viðmerkingunum sendi Løgmansskrivstovan eisini skjølini í málinum. Innihaldið í skjølunum er í høvuðsheitum endurgivið í viðmerkingunum hjá Løgmansskrivstovuni, og umboðsmaðurin metir tað tískil ikki vera neyðugt at endurgeva hesi í fullari longd.

Við skrivi, dagfest 17. februar 2015, vórðu viðmerkingarnar hjá Løgmansskrivstovuni sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Tann 27. mars 2015 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**"Viðv. klagu um B, løgmann, dagfest 29. desember 2014**
Bæði løgmaður og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum noktaðu at gera samrøðu við A um rikna fiskivinnupolitikkin í sambandi við sendirøð um sama í Kringvarpinum. Grundgevingarnar fyri at nokta luttøku eru tó sera ymiskar. Meðan landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum *ikki* vil vera við, at hann ger mismun á journalistum, ger løgmaður púra greitt, at hann hevur *fullan rætt* til at gera mismun á journalistum.

Løgmaður hevur gjørt fleiri samrøður við ymsar journalistar um rikna fiskivinnupolitikkin, men hann vil ikki gera eina líknandi samrøðu við A. Vit meta ikki, at hetta kann gerast til ein einfaldan spurning um talifrælsið hjá løgmanni. Løgmaður er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í Føroyum. Tí hevur hann skyldu til at úttala seg. Hann eigur eisini at vera fremsta fyrimyndin fyri góðan fyrisitingarsið, har ein tann mest grundleggjandi reglan er líkareglan. Tá løgmaður fegin vil gera samrøður við aðrar journalistar um rikna fiskivinnupolitikkin, so eigur hann sambært líkaregluni eisini at gera samrøður við A.

Tað hevur fyrrverandi danski umboðsmaðurin, Hans Gammeltoft-Hansen, eisini sligið fast í einum parallellum dømi um ein journalist á Ekstrablaðnum og táverandi forsætismála-ráðharra, Anders Fogh Rasmussen. Hans Gammeltoft-Hansen skrivar soleiðis um tað málið:

> *"Man må ikke som offentlig myndighed blackliste en bestemt journalist. Eller rettere, det må man sådan set godt; men <u>så skal man have nogle virkelig gode og saglige grunde for at gøre det"</u>.*

Vit finna ongar veruliga góðar og sakligar grundgevingar í skrivinum frá Løgmansskrivstovuni. Løgmansskrivstovan skrivar, at *"sjálvsagt mugu vit leggja til grund, at løgmaður hevur sakligar grundir fyri at nokta".* Men hvørjar hesar sakligu grundgevingar eru, skrivar Løgmansskrivstovan einki um. Tað verður skrivað, at løgmaður *"hevur so ringar royndir av honum"* (A), men hvørjar hesar ringu royndir eru, verður einki skrivað um. Løgmansskrivstovan skrivar, at *"í øllum førum má tað verða journalisturin, sum lyftir próvbyrðuna fyri ósakligum grundum".* At onki í skrivinum frá Løgmansskrivstovuni undirbyggir, hví løgmaður hevur valt at blacklista A, er próvførsla nokk til at staðfesta, at hetta er ein ósaklig avgerð.

A ger kritiskan journalistikk. Kritiskur journalistikkur verður í demokratiskum londum roknaður sum ein grundsúla undir einum vælvirkandi fólkaræði. Kritiskur journalistikkur skal elva til kjak, skal elva til upplýsing og kann harvið skapa politisk og umsitingarligt órógv. Tað er endamálið við journalistikkinum. Pkt. 1.2 í leiðreglunum um góðan fjølmiðlasið ljóðar soleiðis: *"Fjølmiðlar eiga at bera tíðindi, upplýsa, kunna, íbirta orðaskifti og at viðgera samfelagslig mál kritiskt".*

Vit eru heldur ikki samd við Løgmansskrivstovuni í, at tað er eitt serliga "høviskt inntriv", tá landsins hægsti leiðari velur ikki at úttala seg til ein navngivnan journalist heldur enn at kæra til Fjølmiðlanevndina. Løgmaður hevur ikki samskift við A, men hann hevur tó sagt við www.portal.fo 16. januar í ár (2015), at *"eg ynski ikki at tosa við A, tí hann fer so illani við fólki".* At løgmaður ikki tosar <u>við</u> viðkomandi navngivna journalist, men heldur tosar <u>um</u> nevnda journalist, sum hann alment leggur undir at fara illani við fólki, er ikki beinleiðis høviskt av landsins hægsta leiðara, soleiðis sum Løgmansskrivstovan leggur upp til. Tvørturímóti.

Vit harmast eisini um, at løgmaður í somu samrøðu sigur við www.portal.fo, at hann hevur bjóðað A at gera eina beinleiðis samrøðu. Hetta er heilt einfalt ikki sannleikin. Tað kemur eisini greitt fram í samskiftinum millum Kringvarpið og Løgmansskrivstovuna, ið verður endurgivið í viðmerkingunum frá Løgmansskrivstovuni. Hví løgmaður sigur hetta við www.portal.fo, skilja vit ikki. Fyri ein góðan ordans skyld, skal viðmerkjast, at UM løgmaður hevði ynskt eina beinleiðis samrøðu heldur enn eina bandaða samrøðu til sendingina, hevði Kringvarpið ikki gingið ynskinum á møti.

Vit halda eisini, at tað er í stríð við góðan fyrisitingarsið, at tað er so stórur munur á grundgevingunum frá fyrisitingini um, *hví* løgmaður ikki ynskir at luttaka í samrøðu við A.

> At umsitingin hjá løgmanni uppfinnur ymsar orsøkir, tá veruliga orsøkin er, at løgmaður í longri tíð uttan sakliga grundgeving hevur valt at blacklista A, er hvørki álitisvekjandi ella sakligt. Vit mugu sum minsta mark krevja, at tær grundgevingar vit fáa frá Løgmansskrivstovuni eru *veruligu* grundgevingarnar fyri, at ávísar niðurstøður verða gjørdar. Ikki bara ein hent grundgeving, sum embætisfólk finna uppá, tí tey hava illgruna um, at ongar sakligar grundgevingar finnast, ella at veruligu grundgevingarnar eru ov veikar."

Við skrivi, dagfest 14. apríl 2015, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Løgmansskrivstovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur.

Tann 5. mai 2015 boðaði Løgmansskrivstovan umboðsmanninum frá, at hon hevði ikki fleiri viðmerkingar. Tann 19. mai 2015 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at tað ikki varð mett at verða neyðugt við framhaldandi partshoyringum.

**Niðurstøða**

Kringvarp Føroya hevur klagað til mín um, at táverandi løgmaður í 2014 noktaði at gera samrøðu við ein navngivnan journalist til eina sjónvarpssending um fiskivinnu. Løgmaður sýtti fyri at gera samrøðuna við teirri grundgeving, at hann hevði ikki álit á journalistinum.

Kringvarpið er av teirri fatan, at løgmaður ikki helt fyrisitingarligu meginreglurnar um líkheit og sakligheit og hevur í hesum sambandi víst á, at løgmaður tosaði við aðrar journalistar um sama mál. Eisini heldur Kringvarpið, at atlit verða ikki tikin at talufrælsinum í slíkum føri, tí møguleikin hjá journalistinum at fáa upplýsingar um týðandi samfelagslig mál viknar.

Løgmansskrivstovan førir í frágreiðing til mín fram, at løgmaður eigur at hava rættiliga víðar træsir at gera av, um hann metir seg hava álit á einum journalisti, at hetta illa kann eftirmetast av øðrum, og at tað má leggjast til grund, at løgmaður hevur sakligar grundir fyri at nokta at gera samrøðu við journalistin.

Innlitslógin gevur borgarum og journalistum rætt til at fáa innlit í viðurskifti hjá almennum myndugleikum við at fáa skjøl útflýggjað. At fáa eina samrøðu við løgmann ella eitt landsstýrisfólk er ikki fevnt av innlitslógini, og lóggávan áleggur ikki myndugleikum ella landsstýrisfólkum at luttaka í eini fjølmiðlasamrøðu. Vanliga úttala politikarar seg tó til fjølmiðlarnar, og er hetta at meta sum ein háttur at geva meirinnlit.

Í allari fyrisiting eru galdandi grundleggjandi meginreglurnar um at fyrisita sakliga og at viðfara lík føri á sama hátt. Hetta ger seg eisini galdandi, tá tað snýr seg um at geva meirinnlit, ella tá upplýsingar verða latnar fjølmiðlunum. Fjølmiðlar og journalistar hava tískil krav uppá at verða viðfarnir eins í slíkum førum.

Tá løgmaður ella landsstýrisfólk skulu taka støðu til, um tey ynskja at luttaka í eini samrøðu við ein fjølmiðil, gera tey sjálvi av, um tey ynskja at úttala seg. Tað kann vera, at málið er ikki búgvið at úttala seg um, ella at tey einki hava at bera fram um málið í støðuni.

Í førinum, sum klagað er um, sýtti løgmaður fyri at gera samrøðu við ein ávísan journalist til eina sjónvarpssending, tí hann segði seg ikki hava álit á journalistinum, sum gjørdi sendingina.

Bæði løgmaður og embætisfólk hansara eru eisini í teirra samskifti við fjølmiðlarnar bundin av meginregluni um sakliga fyrisiting. Vantandi álit á journalistinum kann vera ein saklig orsøk til ikki at vilja gera eina samrøðu. Hetta kann til dømis vera, um journalisturin rekur illoyalan journalistikk. Tað er eftir míni meting tó ikki sakligt, um orsøkin er, at journalisturin er kritiskur í mun til rikna politikkin.

Kringvarpið vil í klaguni vera við, at løgmaður konsekvent sýtti fyri at gera samrøður við journalistin og vísti á, at táverandi løgmaður vildi heldur ikki luttaka í sjónvarpssendingum um “Toll-málið” og “Eik-málið”. Grundað á upplýsingarnar í málinum havi eg ikki grundarlag fyri at staðfesta, um hetta var so. Í hesum sambandi skal eg vísa á, at tað m.a. framgongur av tilfari frá Norðlýsinum, sum varð lagt við klaguni, at løgmaður sendi journalistinum eitt skrivligt íkast við upplýsingum um faktisk viðurskifti í sambandi við sendingina um Eik.

Løgmansskrivstovan hevur undir partshoyringini ført fram, at gangast má út frá, at løgmaður er sakligur, tá hann sigur seg ikki hava álit á einum journalisti, og at hetta illa kann eftirmetast av øðrum. Eg eri ikki samd við hesum sjónarmiði. Greitt er, at ein subjektiv fatan um vantandi álit kann ikki metast út frá einum objektivum metingarstøði, men meginreglan um sakliga fyrisiting krevur tó, at løgmaður kann greiða frá orsøkunum til, at hann ikki hevur álit á einum journalisti. Hetta má sum øll onnur fyrisiting eftir mínum tykki tola at verða eftirkannað. Eg fari í hesum sambandi eisini at vísa á § 8, stk. 1 í umboðsmanslógini, har ásett er, at myndugleikar hava skyldu til at lata umboðsmanninum tær upplýsingar, sum umboðsmaðurin biður um.

Í ítøkiliga førinum, sum klagað er um, segði løgmaður seg hava “so ringar royndir av journalistinum”. Tað er ikki greitt, um orsøkin til ringu royndirnar av journalistinum eru negativ og kritisk umrøða av løgmanni og rikna politikkinum, ella um misálitið var grundað á illoyalan journalistikk. Grundgevingin hjá løgmanni er ikki nærri útgreinað, og tá táverandi løgmaður ikki longur situr í embætinum, havi eg ikki møguleika at gera meira við hendan spurningin.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður